# Innskriving til 1. flokk

Fyrsta dagin verður innskriving av børnum, sum skulu byrja í 1. flokki í Tórshavnar Kommunu aftan á summarfrítíðina

Børn, sum eru fødd fyri 1. januar 2003, sum skulu í 1. flokk í Tórshavnar Kommunu næsta skúlaár, skulu skriva børnini upp týsdagin 27. ella mikudagin 28. januar 2009.

Kommunan sigur, at tað ber til at ynskja ein ávísan skúla, men um pláss ikki er fyri øllum, sum búgva næst skúlan, verður neyðugt at flyta næmingar, har pláss er.

Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fáa skúlarnir og foreldrini boð um, í hvønn skúla næmingar koma í í 1. flokk.

Skúlarnir í høvuðsstaðarøkinum eru: Argja skúli, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt

Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er.

Innskrivingin er í býráðssalinum týsdagin 27. og mikudagin 28. januar, báðar dagarnar kl. 15.00–18.00. Havið avrit av dóps-/navnabrævi við. Eisini ber til at ringja í býráðssalin somu tíð á telefon 25 40 10.






NORA skaber samarbejde i Nordatlanten

Nordisk Atlantsamarbejde (NORA) ønsker at styrke samarbejdet i Nordatlanten for derigennem at skabe en kraftfuld nordisk region med en stærk, bæredygtig økonomisk udvikling.

Som ét af redskaberne til at nå dette mål bevilger NORA to gange om året støtte til samarbejdsprojekter, som inddrager partnere fra mindst to af de fire NORA-lande (Grønland, Island, Færøerne og Kystnorge).

Hermed indkaldes projektforslag til den første bevillingsrunde i 2009.

NORA modtager ansøgninger indenfor alle fire prioritetssektorer: MARINE RESSOURCER, TURISME, INFORMATIONS- OG KOMMUNIKATIONSTEKNOLOGI og TRANSPORT.

Under overskriften ØVRIGT REGIONSSAMARBEJDE kan projektforslag, som falder uden for de ovennævnte sektorer, ligeledes komme i betragtning, hvis de bidrager til opfyldelsen af NORAs overordnede målsætninger.

NORA har i handlingsplanen for 2009 sat fokus på samarbejdet med Nordens vestlige naboer og ser derfor gerne ansøgninger med partnere fra især Canada, men også fra NORA-regionens sydlige naboer på de skotske øer.

Ansøgningsfristen er
**mandag den 2. marts 2009.**

Mulige projektansøgere kan få mere information på www.nora.fo, hvor man også kan hente det obligatoriske ansøgningsskema.

SENDISTOVAN

Nordisk Atlantsamarbejde (NORA) er en grænseregional komité under Nordisk Ministerråd. NORA omfatter Grønland, Island, Færøerne og Kystnorge. NORA finansieres af Nordisk Ministerråd suppleret med et nationalt bidrag fra samarbejdets fire deltagerlande.

NORA
Nordic Atlantic Cooperation

NORDISK ATLANTSAMARBEJDE
Bryggjubakki 12 · Box 259 · FO-110 Tórshavn
Tel: +298 30 69 90 · Fax: +298 30 69 01




# Ókeypis atgongd til sjónvarps konsert við Lenu Anderssen

Týskvøldið 3. februar filmar danska sjónvarpsrásin DK4 konsert við Lenu Anderssen í Århus. Talan er um konsert, har til ber at ogna tær ókeypis atgongumerki.

Á heimasíðuni síni lýsir danska sjónvarpsstøðin DK4 við konsertini og har ber eisini til at bíleggja ókeypis atgongumerki til framførsluna við føroysku songkvinnuni, sum verður tikin upp í upptøkuhølunum hjá sjónvarpsrásini í Århus 3. februar.

Feiri donsk og altjóða nøvn hava spælt líknandi sjónvarps konsertir har seinasta árið, teirra millum Katie Melua, Aura, Poul Dissing, Tue West.

Eisini føroysku Teitur og Maria Guttesen hava framført á DK4 nýliga.

Lena, sum í desember varð kosin "Ársins Songkvinna" á Planet Awards, hevur fyri stuttum givið út fløguna "Let Your Scars Dance" í Danmark.

Til ber at tryggja sær atgongd til konsertina her:

# Borgarafundur

## Borgarafundur um bráðfeingistørv hjá røktarkrevjandi

ELDRAPOLITIKKUR

Bráðfeingistørvurin hjá røktarkrevjandi í Tórshavnar kommunu er evni, ið verður viðgjørt á borgarafundi í auluni í Tórshavnar Kommunuskúla mikukvøldið 28. januar kl. 19:30.

Fyrireikarar eru Daisy Sloan, Jóna Mortensen og Sigrún Mohr.

Heimasíðan hjá Tórshavnar Kommunu skrivar frá fyrireikarunum, at í longri tíð hevur javnan verið at hoyrt, hvussu vánalig støðan er innan eldraøkið, serliga í Tórshavnar kommunu.

- Støðan er so mikið álvarslig hjá nógvum eldri borgarum, at ikki ber til at vera vitandi um hetta og einki at gera við trupulleikan, siga tær við www.torshavn.fo

- Eru børn ella djór fyri vanrøkt, hava borgararnir fráboðanarskyldu, og so traðkar avvarðandi myndugleiki til og tekur sær av málinum, siga tær tríggjar og staðfesta, at sama er ikki galdandi, tá ið tað snýr seg um gomul fólk, ið hava hjálp fyri neyðini.

- Hetta málið hevur í nógv ár verið kastibløka millum lands- og kommunalpolitikarar, nú er tíðin komin, har vit í felag mugu royna at finna "alternativar" loysnir, tí verður skipað fyri borgarafundi um hetta evnið, og vóna fyrireikararnir, at nógv fólk við góðum hugskotum koma við á fundin, siga tær.

### Skráin fyri borgarafundin verður henda:

Daisy Sloan, fyrireikari, bjóðar vælkomin og sigur frá, hvussu hon hevur tað, nú mamma hennara ikki klárar seg sjálv longur
Jóna Mortensen, fyrireikari
Turið Jacobsen, ergoterapeutur
Hermann Oskarsson, búskarfrøðingur, lýsir tørvin innan eldraøkið við hagtølum
Halgir W. Poulsen, løgfrøðingur: Ber til at sýta óhjálpnum borgarum hjálp?
Heðin Mortensen, borgarstjóri
Rósa Samuelsen, landstýriskvinna
Orðið frítt
Fundarstjóri er Hilmar Jan Hansen